Tingmenn finnast harðliga at neyðhjálp

Føroyska neyðhjálpin er ein stór skomm, og føroyingar taka ikki ábyrgd á hesum øki, halda tingmenn. Løgmaður vísir hesum aftur og heldur, at tað er ein spurningur um ítøkiligar ætlanir

NEYÐHJÁLP
Eyðun Klakstein

– Tá samanum kemur kunnu tað tí verða nógvar ferðir 300.000 krónur, sum í hesum árinum verða brúktir til neyðhjálp og menningarhjálp, sigur Anfinn Kallsberg sum svar til tingmenn, sum eru misnøgdir við játtanina til á fíggjarlógini til neyðhjálp

– At landskassin setir 300.000 krónur av til neyðhjálp er ein stór skomm. Og løgmaður mátti ikki komið sær at tosa um at vísa ábyrgd mótvegis fátøkum fólki, tá hann arbeiðir ímóti eini hækking av hesi játtan.

Tað sigur ein bersøgin Jenis av Rana, eftir at løgmaður í nýggjársrøðu síni tosaði nógv um, at føroyingar eiga at taka lut í atgerðum og hjálpararbeiði hjá altjóða samfelagnum.

Føroyingar skulu vísa ábyrgd, segði løgmaður í síni røðu.

– Føroyingar gera sum einstaklingar nógv fyri at hjálpa øðrum fólkum, men sum tjóð vísa vit ikki ábyrgd, heldur Hans Pauli Strøm, sum er tingmaður fyri Javnaðarflokkin.

– Hasar 300.000 krónur kunnu ikki brúkast í miðvísum arbeiði. Hatta eru nøkur oyru, sum kunnu sleingjast út meira ella minni tilvildarliga.

Forða fyri hækking

Hans Pauli Strøm, Jenis av Rana og onnur tingfólk í andstøðuni løgdu undir triðju viðgerð av fíggjarlógini fyri 2002 fram uppskot um at hækka játtanina til neyðhjálp, og tað var ikki fyrstu ferð.

– Trý ár á rað hava vit roynt at fingið hesa játtan hækka, so føroyingar veruliga kunnu veita menningar- og neyðhjálp. Fyrsta árið varð sagt, at fyrst skuldi ein reglugerð gerast fyri brúk av slíkum pengum, og tað var í lagi. Men síðani er hetta argument brúkt so ofta, at talan er meira um eina undanførslu enn nakað annað, heldur Hans Pauli Strøm.

Jenis av Rana heldur, at tær 300.000 krónurnar, sum eru settar av til neyðhjálp og menningarhjálp í ár, eru ein láturlig upphædd.

– Vit eiga at hækka hesa upphædd til einar fýra ella fimm milliónir, men landsstýrið vísir ongan vilja til at seta fleiri pengar av til hetta. Tað er ikki so frægt, at teir hækka upphæddina líðandi, sigur Jenis av Rana.

Vísir øllum aftur

Anfinn Kallsberg, løgmaður, heldur, at føroyingar vísa ábyrgd mótvegis neyðstøddum fólki og londum.

– Í fjør stóðu 200.000 krónur í fíggjarlógini til neyðhjálp, men tá bóðu vit um tríggjar milliónir afturat, so vit kundu hjálpa í Kosovo. Vit høvdu eina ítøkiliga ætlan um hjálp og bóðu um pengar til hana, og tað er soleiðis vit eiga at arbeiða, heldur løgmaður.

– Pengarnir, sum standa á fíggjarlógini til neyðhjálp, eru eingin forðing fyri, at vit kunnu hjálpa við størri upphæddum, tá tað ræður um.

Anfinn Kallsberg vísir tí aftur póstandinum um, at føroyingar ikki vísa ábyrgd á hesum øki og at føroyska neyðhjálpin er ein stór skomm.

– Í Kosovo vístu vit, at vit vilja fegin hjálpa, og vit gjørdu tað á ein slíkan hátt, at pengarnir í mestan mun komu fólkinum til góðar og ikki vóru brúktur í eini kostnaðarmiklari umsiting, sigur hann.

Hjálpa Afghanistan

Løgmaður heldur, at rætti arbeiðshátturin er at gera ítøkiligar ætlanir, áðrenn biðið verður um pengarnar. Hann heldur ikki, at pengar fyrst skulu setast av, soleiðis sum onnur tingfólk vilja.

Í nýggjársrøðu síni vísir løgmaður á, at stig fara at verða tikin til at hjálpa neyðstadda fólkinum í Afghanistan. Landið er bumbað sundur og saman av vesturheiminum seinastu mánaðirnar, og umráðandi er við útlendskari hjálp fyri at byggja landið uppaftur.

– Her fara vit at kanna, hvussu vit kunnu verða við til at hjálpa. Tá vit finna onkra ætlan, har vit kunnu verða við, fara vit at gera neyðuga forarbeiðið og síðani biða um neyðugu pengarnar frá løgtinginum, sigur Anfinn Kallsberg.

– Tá samanum kemur kunnu tað tí verða nógvar ferðir 300.000 krónur, sum í hesum árinum verða brúktir til neyðhjálp og menningarhjálp, sigur løgmaður.

Jenis av Rana:

- Vit hava kriminalitet og stættarmun

Nýggjársrøðan hjá løgmanni var misvísandi, tí vit hava bæði kriminalitet og stættarmun í Føroyum, heldur Jenis av Rana, tingmaður fyri Miðflokkin

NÝGGJÁRSRØÐA
Eyðun Klakstein



– Tað er ótrúligt, at løgmaður skal siga at eingin kriminalitetur er í Føroyum í sama ári, sum foreldur í Havn hava gjørt eitt vaktarlið, sum verður sent út á gøtuna fyri at ansa eftir børnunum, heldur Jenis av Rana

Jenis av Rana heldur, at nýggjársrøðan hjá løgmanni kemur við skeivum póstandinum um føroyska samfelagið. Jenis sipar til útsøgnina hjá løgmanni um, at samanborið við onnur lond hava føroyingar hvørki kriminalitet ella stættarbýti.

– Tað er nakað forferdiligt tvætl at siga, at vit ongan kriminalitet ella stættarmun hava í Føroyum. Vit eru eitt minisamfelag, men vit hava sanniliga bæði kriminalitet og stættarmun. Høvdu vit rokna lutvíst mótvegis øðrum londum, so hevði úrslitið var eitt heilt annað, enn tað sum løgmaður kemur til, sigur tingmaðurin fyri Miðflokkin.

– Tað er ótrúligt, at løgmaður skal siga hetta í sama ári, sum foreldur í Havn hava gjørt eitt vaktarlið, sum verður sent út á gøtuna fyri at ansa eftir børnunum. Harafturat florera narkotisk evni í føroyska samfelagnum, so tað langt við síðuna av at siga slíkt.

– Fólk, sum eru úti á gøtuni á nátt siga, at vit politikarar vita als ikki, hvat vit tosa um. Tí støðan á gøtuni er ein heilt onnur, enn politikarar vilja gera hana til. Hevði løgmaður ferðast í øðrum umhvørvi, so hevði hann sagt nakað annað um kriminalitet og stættarmun, heldur Jenis av Rana.

Forðaði fólkinum

Jenis av Rana er eisini harmur um, at løgmaður í innleiðingini til nýggjársrøðu sína sigur, at føroyingar í farna ári tóku stórar avgerðir fram móti sjálvbjargni.

– Hetta sigur maðurin, sum forðaði fyri, at føroyingar fingu høvi at siga sína hugsan um fullveldisætlanina hjá landsstýrinum, sigur Jenis av Rana og sipar til, at ætlaða fólkaatkvøðan var avlýst, tá vandin var stórur fyri, at fólkið fór at siga nei til fullveldisætlanina hjá landsstýrinum.

– Tú kanst ivast í, hvussu stór stigini móti sjálvbjargni vóru, men tað varð noktað fólkinum at siga sína hugsan um hesa ætlan. Løgmaður kundi sagt, at føroyingar tóku stig fram móti sjálvbjargni, um fólkið hevði sagt ja á eini fólkaatkvøðu, men tað forðaði hann teimum fyri, heldur Jenis.

Ferðslutrygdin fremst

Ferðslutrygdin í samband við skúlan á Giljanesi er saman við stórari útstykking og bygging av barnagarði stórmálini, Sandavágs Kommuna arbeiðir við í løtuni

KOMMUNUMÁL
Edvard Joensen

Sandavágur er bygd í vøkstri, og tað hevur, saman við komandi undirsjóvartunnlinum, eisini økta ferðslu við sær. Sandavágs Kommuna tekur hendan trupulleikan í álvara og er farin undir at arbeiða fyri øktari ferðslutrygd í bygdini

Mynd: Edvard Joensen

Tað skal nakað ítøkiligt gerast fyri at økja um ferðslutrygdina til og frá skúlanum á Giljanesi, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági. Kommunan og Landsverkfrøðingurin eru farin undir arbeiðið.

Ferðslan í Giljum, har skúlabørnini, sum ganga á Giljanesi, ferðast, fer at økjast frá at vera nógv sum er, til at verða øgilig, tá undirsjóvartunnilin verður liðugur, væntar borgarstjórin.

Tí eru tey farin at gera nakað við trygdina, sigur Rósa Samuelsen. Ferðmátingar hava verið gjørdar í heyst, og fundur hevur verið við Landsverkfrøðingin um, hvat gerast kann. Ymisk uppskot hava verið frammi, og væntandi fer ein loysn við ferðsluforðingum á vegastrekkinum í Giljum at verða vald.

Tosað hevur verið um at gera rundkoyring, har vegurin fer heim í bygdina Sandamegin, beint oman fyri Kommunuhúsið. Men ta loysnina tykjast landsmyndugleikarnir ikki at vera so fegnir fyri, sigur Rósa Samuelsen. Hinvegin roknar hon við, at ein forðing við forskjóting av gonguteiginum nærri skúlanum fer at gerast veruleiki. Tann loysnin fer at líkjast henni, sum gjørt er í R.C. Effersøesgøtu við SMS og Apotekið, greiðir Rósa Samuelsen frá.

Vegurin gjøgnum Sandavág er landsvegur, og tí er neyðugt við samstarvi við Landsverkfrøðingin.

Í Miðvági verður eisini arbeitt við ferðslutrygdini. Miðvingar ganga eisini í skúla á Giljanesi. Men har er partur av vegnum kommunalur, og tað gevur miðvingum nógv víðari ræsur at gera, sum teir vilja hava tað.

Nógv tilflyting

Fólk tykjast hava álit á, at tað verður liviligt í Sandavági, tá tunnilin kemur, sigur borgarstjórin.

Sandavágs Kommuna hevur eina útstykking Norðuri í Sørpum, sum tey nevna. Nakað heimavert vakstrarhúsið. Og har ganga grundstykkini sum heitt breyð.

Tey 22 grundstykkini í hesi ætlanini eru seld, og 10 hús verða bygd nú beinanveg, sigur borgarstjórin.

Arbeitt veðrur í løtuni við at gera kloakkskipanina lidna. Eitt nú skal øll útstykkingin hava felags rotangaskipan. Síðan skal Matrikulstovan leggja seinastu hond á, áðrenn klárt verður hjá teimum fyrstu at byggja. Tað verður væntandi seinast í januar ella so, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri.

Men tey 22 stykkini tykjast ikki vera nóg mikið, sigur hon, tí sum er eru einar átta umsóknir á bíðilista.

– Tað koma fyrispurningar at kalla hvønn dag, sigur Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági.

Dagstovnur

Sum so mangastaðni er eisini dagstovnur eitt mál, sum kommunan arbeiðir við. Tørvurin er stórur, og hann verður væntandi loystur samstundis sum undirsjóvartunnilin kemur ígjøgnum.

Tað tykist, sum undirsjóvartunnilin fer at gerast líkasum eitt slag av tíðarfesting í Vágum. Tað fer at verða tosað um tíðina undan og eftir tunnilin.

Sandavágs Kommuna er farin undir fyrireikingarnar til at byggja ein stóran dagstovn fram við ánni millum Kommunuhúsið og Føroya Banka.

Rósa Samuelsne sigur, at stovnurin skal kunna hýsa 80 barnagarðsbørnum. Ella, um býtt verður sundur, umleið 40 barnagarðsbørnum og umleið 30 vøggustovubørnum. Í løtuni eru umleið 50-55 børn í komunalu dagrøktini. Bíðilisti er eingin, og børn verða tikin inn, so hvørt tørvurin er.

Grivið er út fyri nýggja dagstovninum, men sjálvt byggiarbeiðið er ikki boðið út enn. Tað verður gjørt fyrsta dagin, og væntandi kann arbeiðið so byrja einaferð í februar, væntar Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági.

Við eldi í reyvini

Nýggjársaftan koyrdi liðbussurin hjá Bygdaleiðum bókstaviliga við eldi í reyvini gjøgnum Leynatunnilin. Bussførarin varnaðist eldin beinanveg, hann var komin inn í tunnilin Leynamegin, men koyrdi gjøgnum allan tunnilin, áðrenn hann steðgaði

ELDUR
Edvard Joensen

Rói Ljósheim, bussførari, fekk handað blómutyssi frá Randi Kúrberg, sum var eitt av ferðafólkunum í liðbussinum nýggjársaftan

Mynd: Jens Kristian Vang

Tað vóru gul blunk afturút, sum fingu bussføraran á liðbussinum at varnast, at eldur var í bussinum. Hann valdi at koyra víðari, hóast hann júst var komin inn í Leynatunnilin á veg av flogvøllinum til Havnar. Tað hevði tikið longri tíð at steðgað og bakkað útaftur hinumegin, metti hann.

Tann avgerðin var ivaleyst eisini skilagóð á annan hátt, tí vindur var vestaneftir, sum rak roykin fram við bussinum. Roykur og møguliga onnur eitrandi luft kundi soleiðis komið inn í bussin, um hann bakkaði upp í vindin. Men nú koyrdi hann undan, og alt hetta fór tí afturút.

Komin út Kollafjarðarmegin steðgaði hann bussinum og fór út at royna at sløkkja eldin. Tað eydnaðist ikki, og bussurin fór fyri einki.

Seinnapartin mikudagin var lítil samkoma á Strandferðsluni Yviri við Strond, har millum annað eitt av ferðafólkunum í bussinum hendan dagin handaði føraranum eitt blómutyssi. Hetta til at vísa takksemi fyri, at førarin bar seg so skilagott at, at ferðafólkini ongantíð høvdu fyri neyðin at kenna ampa á sær.

Og rólig hava tey verið. Tí eftir at førarin til fánýtis hevði roynt at sløkkja eldin, fór hann sjálvur inn aftur í bussin eftir ferðaseðlamaskinuni og peningataskuni, eins og hann lat ferðafólkið fara inn aftur eftir viðførí og klæðum, sum lógu inni á setrunum. Eisini fingu feðrafólkini tað viðførið, sum lá í viðførisrúmunum uttanfyri, meðan bussurin brann.

Hóast roynt varð at fáa at vita á tíðindafundinum mikudagin, um eingin reglugerð er, sum sigur nágreiniliga, hvussu berast skal at í slíkum føri, og um tað nú er skilagott at lata fólk fara inn aftur í ein buss, sum eldur er í, fekst einki greitt svar. Hvørki frá bussføraranum sjálvum ella frá fólkaflutningsleiðaranum hjá Strandferðsluni, sum eisini var til staðar.

Víst varð á, at tað kundi verið vandamikið bæði av eldi og eitrandi royki, tá soleiðis er, at lata fólk fara inn í bussin.

Men bussførarin metti ikki, at tað var nakar vandi. Eldurin var ikki komin inn í bussin, tá hetta hendi, greiddi hann frá. Hann helt, at tað gingu kanska einir tíggju minuttir, áðrenn eldurin var komin inn í sjálvan bussin. Men so gekk tað eisini skjótt við restini.

Hvørki førari ella ferðafólk hugsaðu nakrantíð um, at nakar vandi var á ferð soleiðis. Tey fóru stilliliga fram og kendu ongantíð nakran ótta yvirhøvur, greiddu tey frá á tíðindafundinum mikudagin.

Bussførarin, Rói Ljósheim úr Havn, hevur drúgvar royndir. Hann byrjaði á nýggjárinum 1980 sum bussførari hjá HT í Keypmannahavn og hevur sostatt júst í hesum døgum koyrt buss í 22 ár.

Bussurin, sum nú er vrak, hevur annars havt ávísar trupulleikar, síðan hann fyri hálvumøðrum ári síðan varð keyptur til Føroya. Men mett varð kortini, at hann var tryggur at koyra við, sigur fólkaflutningsleiðarin á Strandferðsluni. Hann hevur regluliga verið til eftirlit fyri at halda allar fyriskipanir. Eina ferð um vikuna ella so, verður sagt.

Kortini var eingin ávarðingarskipan, sum segði frá, at eldur var í, greiðir bussførarin frá. Eingin lampa ella alarmur. Einans tað merkiliga gula blunkið afturút, sum fekk hann at varnast, at hann koyrdi við eldi í reyvini.